# Rottur gnaga káplar á

**Seinnapartin fríggjadagin vóru menn frá R2 Net á Støðlafjalli og umvældu eitt brek í sendiútgerðini. Við tyrlu vóru útgerð, amboð og menn flutt niðan higar. - Netið hjá okkum má bara rigga, sigur Petur Jacobsen, stjóri á R2 Net við Sosialin og Rás2**

SENDARI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Ólavur Frederiksen*



*Petur Jacobsen hevur mangar ferðir áður verið her á toppinum á Støðlafjalli. Hesaferð var útgerðin so rúgvusmikil, at tyrlan mátti brúkast at flyta hana niðan*

**Á Støðlafjalli:** Tað sær ikki so bratt út, men tað er kortini ein fittur gongutúrur, um ein avgerð at ganga av Gøtueiði og niðan á Støðlafjall.

Fleiri hava roynt henda túrin, men tá hevur viðførið ikki verið av slíkum slagi sum seinasta fríggjadag.

Tá skuldu nevniliga Petur Jacobsen og sonurin, Jan enn einaferð niðan á hetta fjallið, ið er omanfyri 500 metrar høgt. Men hesaferð var viðførið av slíkum slagi, at ein ikki vil sleppa undan at bera tað so langt.

Talan var um sendiútgerð, káplar, partar av eini antennu og onnur amboð, ið tveir so tøkniliga kønir menn sum teir báðir hava fyri neyðini, tá eitt slíkt arbeiði skal gerast. Fyri at létta um hjá teimum var tyrlan boðsend til endamálið. Bæði útgerð, amboð og fólk skuldu flytast av tyrlupallinum í Klaksvík og niðan á Støðlafjall.

Tyrlan skuldi fara haðani stundisliga kl. 12:11, fyri at tað ikki skuldi ganga út yvir ferðaætlanina restina av hesum degnum. Flúgvast skuldi beinleiðis á fjallatoppin, og eftir stuttan steðg aftur til Klaksvíkar við teirri slitnu útgerðini.

Tað ráddi bert um hjá teimum báðum R2-monnunum og umboðunum fyri tíðindatænastuna at vera til reiðar hesa løtuna. Her var eingin tíð at spilla!

## Gera stóran skaða

Stjórin í R2 Net, Petur Jacobsen hevur bert eitt ynski: At lurtararnir hjá Rás 2 skulu hoyra allar sendingarnar altíð.

Kring landið hava teir fleiri sendistøðir, sum hava til endamáls at tryggja hetta. Í løtuni er hetta gjørligt í øllum landinum, tó eru ávís støð í ávísum bygdum, har tað ikki hoyrist, millum annað í Tjørnuvík.

Á Støðlafjalli stendur ein týðandi sendari, um ein kann siga tað so. Og tá trupulleikar eru við hesum sendaranum, so rakar tað eisini fleiri av hinum. Soleiðis var støðan fram til henda fríggjadagin.

Trupulleikarnir á sendistøðini hjá R2 Net heruppi í 510 metrar hædd, byrjaðu fyri eini trimum mánaðum síðani. Teir hava síðani roynt at funnið feilin, og hava eisini gjørt tað fleiri ferðir. Men tað vísti seg, at feilurin kom aftur líka so skjótt, uttan at teir funnu útav hví so var.

- Men umsíðir funnu vit so fram til, at tað vóru rottur sum høvdu spælt okkum eitt puss. Tær høvdu simpelthen gnagað seg upp gjøgnum gólvið, og hava havt til fragd at gnaga í káplunum, soleiðis at lítið og einki signal fekst ígjøgnum.

- Nú tóku vit bara avgerð um at gera alt í standa aftur,





*Tyrlan er hent, tá tung útgerð skal flytast niðan á høgt fjall – vinstrumegin stjórin á R2 Net, Petur Jacobsen, í miðjuni flogskiparin Anfinn Frederiksen og við bakinum móti myndamanninum, Jan Jacobsen*



*Jan og Petur Jacobsen høvdu eina stóra uppgávu at loysa henda dagin á Støðlafjalli. Teir tóku tyrluna niðan og vóru við hús aftur um nátturðatíð, eftir strævnan arbeiðsdag í hæddini*